## Svara venjaraspurninginum skjótt

Sámal Ímundarsson, formaður í B36, sigur, at nevndin hevur meira ella minni sett navn á venjaran, sum skal standa á odda fyri liðnum í 2011.

– Sáttmálin er heftur at, hvussu hópurin sær út næsta kappingarár, og tí kunnu vit ikki avdúka navnið her og nú. Men vit vænta, at tað kemur upp á pláss skjótt, sigur Sámal Ímundarsson, sum ikki kann siga, hvør venjarin væntandi verður.

Tað er í øllum førum greitt, at Allan Mørkøre, sum loysti Sigfríð Clementsen av, heldur ikki fram.

Leysasøgur vilja vera við, at John Petersen og Mikkjal Thomassen verða venjarar í 2011. Piotr Krakowski hevur eisini verið upp á tal.

*Uni Holm Johannesen*

## Søbstad fær ongan sáttmála

Stig-Roar Søbstad spælir ikki við B36 í 2011. Tað er framvegis óvist, um Dmitrije Jankovic heldur fram.

Norski framherji, sum flutti til B36 í summar, var eingin fongur hjá árstalsfelagnum. Hann skeyt einki mál í teimum sjey landskappingardystunum, hann spældi fyri B36 í seinnu kappingarhálvu.

Søbstad hevur ikki sannført nevndina um, at hann skal fáa nýggjan sáttmála.

28 ára gamli Søbstad flutti til Føroya, tá hann skrivaði sáttmála við AB á sumri í 2009. Aftaná 27 dystir og 11 mál fyri argjamenn skifti hann til B36.

Sámal Ímundarsson sigur seg vóna, at serbiski Dmitrije Jankovic heldur fram í felagnum. Nevndin er framvegis í sáttmálasamráðingum við verjuleikaran.

# B36 roynir at loysa knútarnar

**FÓTBÓLTUR** Fleiri profilar hava skift felag, og viðhaldsfólkini seta spurnartekin við gongdina. Men nevndin arbeiðir við fleiri loysnum, og felagið brynjar seg til at vinna heiðursmerki í 2011, sigur formaðurin




*Hjalgrím Elttør er millum spælararnar, sum hava skift úr B36*

**Uni Holm Johannesen**

Fyrst skifti Christian Restorff Mouritsen.

– Ætlanin er framvegis at røkka so langt sum tilber sum fótbóltsspælari, segði hann, tá skrivaði undir við íslendska Val.

So fór Jónas Tór Næs sama veg.

Síðan boðaðu Bárður Olsen, EB/Streymur, og Hjalgrím Elttør, KÍ, frá, at teir fóru aftur í sítt barndómsfelag.

Úrslitið er ein skerdur leikarahópur í B36.

Frágongdin av landsliðsleikararum og profilum merkist sjálvsagt.

Sámal Ímundarsson er formaður í B36.

Hann sigur, at tað er ein trupulleiki, tá spælarar fara uttanlands, men nevndin fer sjálvsagt ikki at seta fót fyri teimum.

At Hjalgrím Elttør og Bárður Olsen eru farnir í annað felag, roynir nevndin at venda til ein fyrimun.

– Hjalgrím Elttør og Bárður Olsen er frálíkir spælarar, og teir hava tænt felagnum væl seinasta árið. Tað er hinvegin ein sannroynd, at vit skutu ov fá mál í hesum kappingarárinum. Vit spældu frálíkan fótbólt í fleiri dystum, men tað eru málini og úrslitini, sum eru avgerandi tá avtornar. Tað setur krøv til okkum, og vit skulu hugsa um, hvørjar eginleikar, vit skulu dúva upp á, nú avloysararnir skulu finnast, sigur Sámal Ímundarsson.

### Spælarar eru á veg

Hópurin hjá B36 er nógv broyttur seinastu mánaðirnar.

Umframt Mouritsen, Olsen, Elttør og Næs, fóru Jóan Pauli Dahl Jakobsen og Johan Ellingsgaard til Danmark í lestrarørindum í summar.

Sámal Ímundarsson sigur, at nevndin fer skjótt at kunngera nýggjar leikarar.

– Leisturin er samstundis, at vit vilja menna spælararnar, sum eru uppvaksnir í felagnum. So vit ætla ikki at knýta nógvar spælarar at hópinum. Tað verður hugsa væl og virðiliga, um hvørja avgerð, sigur Sámal Ímundarsson.

### Væl fyri fíggjarliga

B36 brúkti nógvar pengar undan kappingarárinum í fjør.

Sigfríður Clementsen varð settur sum venjari, og Dmitrije Jankovic, Hjalgrím Elttør, Bárður Olsen, Heini í Skorini, Meinhardt Joensen, Símun Joensen vóru knýttir at hópinum.

Kappingarárið miseydnaðist. B36 rakk ikki longur upp enn eitt sætta pláss á stigatalvuni, og felagið skal ikki umboða Føroyar í altjóða kapping í 2011.

Tað merkist, váttar Sámal Ímundarsson. Men hann staðfestir, at felagið er ikki kroyst fíggjarliga.

– Vit hava mist nógvar pengar við ikki at spæla okkum í altjóða kapping. Ovastu liðini hava sjálvsagt betri møguleikar í fíggjarligu kappingini um spælarar. Men tað stendur væl til hjá B36, og vit fara stremba eftir at vinna heiðursmerki næsta kappingarár, sigur Sámal Ímundarsson.